# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Danska A-landsliðið til Føroya

**Mitt í juni kemur danska kvinnulandsliðið í flogbólti til Føroya at spæla tveir dystir ímóti føroyska kvinnulandsliðnum. – Hetta verður bæði upphiting til Oyggjaleikirnar á Álandi og eitt høvi at vísa kvinnuflogbólt á hægri stigi, sigur Magnus Tausen, formaður í Flogbóltssambandinum**




*Tað er vorðið sum upphiting til Oyggjaleikirnar á Álandi, føroysku flogbóltskvinnurnar fáa, nú danska A-landsliðið kemur hendavegin at spæla tveir dystir*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tá føroysku flogbóltskvinnurnar taptu finaluna ímóti Saaremaa á Oyggjaleikunum á Rhodos fyri tveimum árum síðani, gjørdist tað endin á einari drúgvari sigursrøð í oyggjaleikahøpi, tí fýra ferðir á rað høvdu kvinnurnar vunnið gull, men hesa ferð gjørdist tað »bert« til silvur.

Nú einir nýggir Oyggjaleikir standa fyri framman á Álandi, ætla kvinnurnar og Flogbóltssambandið at vinna trúnuna aftur, og tí verður stórur dentur lagdur á best møguligu upphitingina. Og ikki kann sigast annað, enn at tað er eydnast, tí mitt í juni kemur danska A-landsliðið hjá kvinnum til Føroya at spæla tveir dystir.

– Vit hava so ofta ætlað at fingið okkurt dygdargott lið hendavegin at spæla, so føroyingar eisini kunnu sleppa at uppliva flogbólt á hægri stigi í Føroyum. Tá vit nú vendu okkum til tey, ið standa fyri danska kvinnulandsliðnum, var mestsum leyst og liðugt beinanvegin. Tað eru vit øgiliga fegin um, sigur Magnus Tausen, formaður í Flogbóltssambandinum.

Sum skilst, er ætlanin, at danska liðið skal koma til Føroya fríggjadagin 12. juni. Leygarmorgunin 13. juni verður leiðin løgd til Suðuroyar, har ein dystur skal spælast í Trongisvági klokkan 15. Aftan á hann verður farið norðuraftur, og ávegis til flogvøllin taka liðini so ein dyst aftrat á Giljanesi sunnudagin 14. juni klokkan 14.15.

### Sterk mótstøða

– Okkara kvinnur fara til Trongisvágs longu henda sama fríggjamorgunin, so tær eru saman á einari lítlari venjingarlegu har, áðrenn fyrri dysturin verður spældur, og so fylgjast liðini norðuraftur, sigur Magnus Tausen, sum fegnast um møguleikan at fáa eitt so gott landslið hendavegin at spæla.

– Vit eru sum oftast farin av landinum at fyrireika okkum, men at vit nú fáa eitt gott landslið hendavegin, er uppaftur betri. Og nógv betri upphiting til Oyggjaleikirnar kundu vit ikki ynskt okkum, tí danska kvinnulandsliðið er so mikið gott, at okkara kvinnur óivað fáa sterka mótstøðu og tí kunnu fáa nógv burturúr.

Danska A-landsliðið hjá kvinnum spælir eitt nú sínar EM-undankappingarnar í B-bólkinum, sum er ein bólk oman fyri bólkin, Føroyar plaga at spæla í. Og herfyri hava donsku kvinnurnar vunnið á Luxembourg, sum fyri júst einum ári síðani vann EM-undankappingarbólkin, sum var spældur í Føroyum.

– Hetta skuldu blivið tveir dystir, har okkara landsliðskvinnur veruliga fingu seg royndar, og óivað verður hetta eisini eitt fínt høvi at royna nýggja spæliháttin, sum leggur upp til nógv skjótari spæl, enn vit áður hava sæð hjá kvinnunum, sigur Magnus Tausen.

– Sama broyting verður eisini gjørd á manslandsliðnum, so vit gleða okkum til Oyggjaleikirnar, har vit fáa at síggja, um hetta kanska verður besta vápnið ímóti liðum sum Saaremaa, ið vanliga hava stórar og blokksterkar spælarar, sum vit við skjóta spælinum skulu royna at spæla uttanum.

# Oyggjaleikir uttan føroyskar dómarar

**Jan Hentze og Tummas Óli Mortensen verða ikki dómarar á Oyggjaleikunum á Álandi, tí fyrireikararnir hava gjørt av at fáa flogbóltsdómarar úr Svøríki og Finlandi í staðin. – Tað hevði verið stuttligt at sloppið við, men svenskir og finskir dómarar skuldu tó borgað fyri dygd, sigur Jan Hentze**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tá talan er um flogbólt í Oyggjaleikahøpi, plaga Føroyar at standa í fremstu røð á øllum økjum, bæði viðvíkjandi spælinum og ikki minst døminginí. Okkara altjóða dómari, Jan Hentze, hevur saman við Tummas Óla Mortensen verið eitt lýsandi umboð fyri flogbóltsdøming, tá hon er best.

Men hóast dygdirnar hava verið eyðsýndar fleiri ferðir, eru ikki boð eftir teimum báðum, nú Oyggjaleikirnir á Álandi standa fyri durum. Álendsku fyrireikararnir hava helst verið greiðir yvir, at dómaradygdin ofta hevur verið nakað svingandi – ikki minst í Hetlandi í 2005 – og tí hava teir valt at bundið um heilan fingur og biðið svenskar og finskar dómarar dømt flogbóltskappingarnar.

– Tað hevði verið stuttligt at sloppið við, men svenskir og finskir dómarar skuldu tó borgað fyri dygd. Serliga, um talan verður um dómarar á hægsta stigi í Svøríki og Finlandi, tí har eru nógvir, sum eru sera dugnaligir, sigur Jan Hentze, ið tí noyðist at bíða til seinni í juli mánaði at fáa sín altjóða dyst nummar 50.

Hevði hann verið við á Oyggjaleikunum, hevði hann komið upp á runda talið har, tí hann hevur higartil dømt 48 altjóða dystir. Í staðin verður rundi dysturin tann seinni av tveimum dystum í European League-kappingini millum Bretland og Spania, sum verða spældir í Sheffield í Onglandi vikuskiftið 10. til 12. juli.

– At fyrireikararnir av flogbóltinum á Álandi velja eina loysn, ið fevnir um ein pakka við fleiri dómarum, skilji eg væl og tað sigi teir heldur ikki ringar fyri. Hóast nógvir dystir eru, har stórur munur er á liðunum, so krevja teir jøvnu og tøttu dystirnir, at talan er um góðar dómarar, sigur Jan Hentze.

– Og eg kann saktans bíða til vikuna eftir Oyggjaleikirnar, tá eg sleppi at døma Bretland, sum byggir eitt nýtt lið upp til olympisku leikirnar í London í 2012, og Spania, sum fyri tveimum árum síðani var nummar fýra í EM-endaspælinum og telist millum fremstu flogbóltstjóðir í Europa.